Fylgiskjal 18

JARÐFEINGI
FAROESE EARTH AND ENERGY DIRECTORATE

Heilsu- og Innlendismálaráðið

Eirargarður 2

FO-100 Tórshavn

Tórshavn, tann 5. februar 2019

Journ. nr: 18/00011

Viðgjørt: LM

Tygara skriv: j.nr 17/00872-54

# Hoyringarsvar til:

# Uppskot um løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (Náttúrumargfeldislógin)

Umboðandi Jarðfeingi og Búnaðargrunnin nýta vit hetta høvi at senda inn ummæli við felags viðmerkingum til uppskot um løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (Náttúrumargfeldislógin) (tygara j.nr 17/00872-54).

Hetta svarið byggir á drúgvar starvsroyndir í Føroyum umframt drúgt altjóða samstarv innan fakøkir, sum lógin beinleiðis fevnir um, nevniliga landslagsliga og jarðfrøðiliga margfaldið. Grundað á hesar royndir mæla vit til nakrar tillagingar í lógaruppskotinum, sum vit meta at vera alneyðugar, áðrenn tað verður samtykt av løgtinginum.

Grundleggjandi taka vit undir við hugburðinum í hesum lógaruppskoti, sum fylgir norsku lógini um *naturmangfold*. Vit meta, at stórur tørvur er á eini lóg, sum hesari, og at stórur tørvur er á eini vælvirkandi náttúrufyrisiting. Tað er eisini orsøkin til, at vit leggja so stóra áherðslu á endamálsgreinina í lógini, sum sigur, at náttúrumargfeldið fevnir um lívfrøðiliga, landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið. Hesin slóðbrótandi hugburður eigur at verða arbeiddur betri inn í lógartekstin.

**Størsti trupulleiki: verja av landslagsligum og jarðfrøðiligum margfeldi er ikki arbeitt inn í lógina**

Nýggja lógaruppskotið er tiltrongt og spennandi. Lógaruppskotið er eitt frambrot og kann gerast sera virðismikið fyri føroysku náttúruna, um ein stórur trupulleiki við núverandi útgávu verður rættaður: lógarteksturin tekur ikki í nóg stóran mun atlit at eini skilagóðari náttúrumargfeldislóg í Føroyum, soleiðis sum verður sagt í kveikjandi endamálsorðingini § 1: *"Endamálið við lógini er at røkja tað lívfrøðiliga, landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið og*

*tær vistfrøðiligu tilgongdirnar í tí føroysku náttúruni við burðardyggum brúki og vernd, eisini so náttúran kann vera støði undir virki, mentan, heilsu og trivnaði hjá Føroya fólki nú og í framtíðini."* Lógarteksturin nevnir ferð aftaná ferð einans tað lívfrøðiliga margfeldið, meðan geirarnir í lógini viðvíkjandi landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldinum verða mestsum ikki nevndir.

Vit hava lisið norsku *Naturmangfold*-lógina, og staðfesta, at sama vanbýti verður gjørt í hesi lógini. Í føroyskum samanhangi er hetta ein álvarsamur mangul í einum annars góðum lógaruppskoti. Vit mæla staðiliga til, at hesin skeivleiki verður fingin á beint, áðrenn lógin verður viðtikin og tann fyrsta veruliga føroyska náttúrufyrisitingin kann taka við.

Her eru nøkur dømi, har vit meta, at tað landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldi kann nevnast:

Ad § 3: manglandi allýsingar

- Lívfrøðiligt margfeldi verður allýst í pkt 6, men allýsing av landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldinum mangla. Hvat merkja hesi hugtøk, sum faktisk eru rættiliga nýggj, bæði í Føroyum og í okkara grannalondum?
- náttúruslag: lýsingin lýsir ov illa, hvussu landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldi eyðmerkja eitt náttúruslag. Dentur verður einans lagdur á lívverur.

Ad § 4: nevnt verður at "miðast skal eftir at varðveita margfeldið av náttúrusløgum", men síðan verður einans víst til sløg (species), vistfrøðiligar tilgongdir og framleidni hjá vistskipanum. Her eigur landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið at nevnast afturat. Hugtakið *vistskipan* verður vanliga nýtt um eitt samlað umhvørvið, við teim livandi og teim ikki-livandi elementunum, á ein hátt soleiðis at lívfrøðin er í fokus. Ein vanlig allýsing av eini vistskipan er eitt avmarkað øki í náttúruni, har samanspæl er millum tær livandi verurnar og umhvørvi teirra. Um ein skal vera tilvitað/ur um tað landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið, og hvussu hetta skal røkjast, er eisini neyðugt at vera før/ur fyri at taka støði í tí ikki-lívfrøðiliga fysiska náttúruumhvørvinum. Hetta manglar í lógartekstinum í løtuni.

Ad § 8: Her verður sagt, at almennar avgerðir skulu byggja á "vísindaliga vitan um stovnsstøðuna hjá sløgum, útbreiðsluna og tann vistfrøðiliga standin hjá náttúrusløgum av árinum". Aftur her manglar at verða nevnt, at avgerðir sambært lógini skulu byggja á vísindaliga vitan um tað samlaða náttúrumargfeldið, sum eisini fevnir um landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið.

Ad § 10: her verður tosað um heildartrýstið á vistskipanina, og hervið bert um tey viðurskifti sum viðvíkja teimum livandi verunum. Um lógin skal fylgja egnu endamálsorðing síni og røkja lívfrøðiliga, landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið er neyðugt, at henda avmarking verður tikin burtur, soleiðis at § 10 nevnir trýstið á náttúruna sum heild, bæði á landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið og ikki einans á vistskipanina.

Í Føroyum er eitt heildartrýst á náttúruna, sum stendst av veðurlagi, brattlendi, seyðahaldi, hvussu vit brúka náttúruna og hvussu vit ferðast í henni, fyri bert at nevna nakrar av táttunum. Lendisspell (enskt: landdegradation) er týdningarmikið hugtak í hesum samanhangi, sum fevnir um allar týðandi tættir, sum lýsa heildartrýstið á náttúruna. Byrjandi lendisspell sæst bert við kønum eygum, men hevur árin á vistskipanina, og so hvørt sum lendisspellið heldur fram tillagast vistskipanin og lívfrøðiliga margfeldið minkar, erosión byrjar og so hvørt sum fysiskt tilfar (jørð, sandur og steinar) fer at flyta seg í landslagnum broytist sjálvt landslagið. Tilgongdin kann halda fram til fulla oyðimarkagerð, soleiðis sum tað sæst fleiri staðni uppi í fjøllunum í Føroyum, har erosión hevur tikið alt burtur. Støð finnast í Føroyum har vallað var í gamlari tíð og nú er einans berur klettur og svarðloysi. Við teimum orðingum, sum standa í lógini verða atlit einans tikin til lívfrøðiliga margfeldið og broytandi vistskipanir, meðan hugburðurin tykist venda blinda eygað til, hvussu broytingar í landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldinum síggja út, og hvussu vit kunnu læra at røkja hesi í Føroyum.

Ad § 21: greinin lýsir raðfest sløg (enskt: species). Kann hugsast, at ein lógargrein kann lýsa náttúrusløg innan landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið, sum verða raðfest og á henda hátt vard? Tørvur er á slíkum lýsingum, og staðfestingum av tí margfeldinum, sum krevur serliga verju.

Ad § 23: tosar um handil og annað, men nevnir einans dýra- og plantusløg. Í mong ár hevur verið víst á trupulleikan, at fólk og serliga útlendingar koma til Føroyar í bólkum at savna inn grót og steinar/mineralir av alskyns slag. Fólk í Føroyum hava undrast á, at eingin lóg forðar slíkari tøku og slíkum handli. Samstundis hava fólk av sínum eintingum valt at geva serstakliga vøkur mineralir úr Føroyum til Jarðfeingi, soleiðis at hesi kunnu verða víst fram á jarðfrøðiligu framsýningini á Tjóðsavninum í Hoyvík, sum Jarðfeingi varðar av. Alneyðugt er, at henda lóg tekur hædd fyri at bøta um hesar manglandi reguleringar.

Ad § 24: aftur her manglar at verða nevnt, at um vandi er fyri, at landslag ella serligir jarðfrøðiligir lutir ella støð verða oydd, skal landsstýrismaðurin hava heimild at seta í verk varðveitslutiltøk.

Ad § 31: kunngerðir um økisverndarmið verða viðgjørd. Í stk 3 verður sagt, at víddin á einum verndarøki skal setast, so vistfrøðiligar funktiónir verða varðveittar. Her átti at verið lagt afturat nakað um heildarsjónarmiðið viðvíkjandi náttúrumargfeldi.

Ad § 32, stk 2: tosað verður um, at ferðsla kann avmarkast ella forbjóðast í avmarkaðum økjum, fyri at verja *plantur ella dýr, mentanarminnir ella jarðfrøðilig fyribrigdir*. Her sakna vit, at nakað verður nevnt um, at eisini leysa jørðildi má verjast, so erosión ikki fær fastatøkur.

Ad § 33: nevnir ítøkiliga, at landslagsverndarøkir skulu hava vistfrøðiligt, mentanarligt ella upplivingarligt virði ella vera samleikaskapandi. Her mangla landslagslig og jarðfrøðilig virði at verða nevnd.

Ad § 35: Lógin nevnir hugtakið "Lívøkisverndarøkir", sum eru støð, sum fáa serliga verju. Henda greinin er eitt gott dømi um, at tað landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið eru býtisbørn í verandi lógarteksti. Yvirskriftin er *Lívøkisverndarøkir*, og tó sigur síðsta reglan í greinini, at heimilað verður at gera lívøkisverndarøkir fyri serlig jarðfrøðilig fyribrigdi. Vit hugsa, at eitt slíkt lívøkisverndarøkir av einum jarðfrøðiligum fyribrigdi sambært § 35 fer at tykjast løgið, tá tað einaferð verður framt. Hópur av avmarkaðum økjum eru nevniliga í Føroyum, sum mugu sigast at vera landslagsliga og jarðfrøðiliga varðveitingarverd, eitt nú Múlaklettur á Eiði ella bakkin í Borðoyarvík. Mugu hesi vera lívøkisverndarøkir fyri at verða vard?

Ad § 36: Verndarøkir í ella á sjónum. Nevnt verður í § 2, stk 1, at gildisøkið hjá lógini er føroyska sjóumveldið, sum er økið út til 12 fjórðingar. Er nøkur orsøk til, at lógin er í gildið út til 12 fjórðingar, heldur enn at fevna um alt tað føroyska sjóøkið út til sjómarkið? Føroyar hava ábyrgd av øllum økinum út til sjómarkið, - er tann ytri parturin av økinum vardur av aðrari lóg? Pkt 5 nevnir nakað um, at verndarøkir, við serligum jarðfrøðiligum fyribrigdum kunnu skipast, - og her er vert at nevna landslagslig fyribrigdið.

Ad § 49: henda grein vísir til § 4, har vit vístu á trupulleikan av, at støði einans verður tikið í vistfrøðiligum spurningum. Ávís náttúrusløg kunnu veljast út, og tað hevur týdning, at slík útveljing kann byggjast á landslagslig og jarðfrøðilig virði.

Vit luttóku á kunnandi fundi í Heilsu- og Innlendismálaráðnum tann 7.mai, um hetta lógaruppskotið. Ein áhugaverd mynd varð løgd fram, sum er við til at lýsa skeivleikan í hugburðinum, sum vit royna at vísa á, - og sum vit meta er einfaldur at rætta.




Myndin roynir at lýsa hugtakið náttúrumargfeldið, sum fevnir um alt frá tí minsta ílegumargfeldinum til alt náttúrumargfeldið. Myndin kemur frá norskari rapport viðvíkjandi norsku naturmangfold-lógina:
[http://www.miljodirektoratet.no/no/Publikasjoner/Publikasjoner-fra-DirNat/Annet/Veileder-for-naturmangfoldloven-kap-II-/](http://www.miljodirektoratet.no/no/Publikasjoner/Publikasjoner-fra-DirNat/Annet/Veileder-for-naturmangfoldloven-kap-II-/)

Vit hava tikið hesa myndina við, tí hon myndar trupulleikan, sum vit royna at vísa á, nevniliga at lógin leggur upp til at røkja lívfrøðiligt margfeldi og ikki náttúrumargfeldi. Myndin og lógarteksturin mótsiga á henda hátt endamálsorðingini í lógini við ikki at seta landslag og jarðfrøði í ein samanhang. Jarðfrøðiliga margfeldi verður teknað sum ein stakur blindtarmur á høgru síðu, meðan landslagsliga margfeldið er teknað sum ein ringur uttaná náttúrusløgum.

Um endamálsorðingin í náttúrumargfeldislógini skal takast fyri fult skuldi kanska raðfylgjan av hugtøkum (t.e. ringum í myndini) verið:

1) Ílegumargfeldið
2) Djóra- og plantusløg
3) Landsløg

4) Jarðfrøði
5) Náttúrusløg

**Fleiri hoyringarsvar til lógaruppskotið:**

**Røktarlandslag.**
Fleiri hugtøk í lógaruppskotinum eru nýggj og spennandi í føroyskum samanhangi. Slík nýhugsan er tiltrongd. Fleiri av teim nýggju hugtøkunum verða tó ikki lýst í allýsingini. T.d. orðið røktarlandslag, sum vanliga verður nevnt kulturlandslag.

**Lendisspell og jarðriv** (erosión)
verða ikki nevnd í lógaruppskotinum, og hetta er ein stórur mangul við lógini, sum eigur at verða rættaður. Lendisspell (landdegradation á enskum) eru broytingar, sum henda orsaka av heildartrýstinum á landslagið. Lendisspell byrjar oftast við lívfrøðiligum broytingum og endar við fullkomnum jarðrivi, jørðerosión. Trupulleikin við lendisspelli er álvarsamur í Føroyum, men hevur verið skúgvaður til viks í mong ár. Tað er trupult at síggja, hvussu tað verður møguligt at røkja landslagsliga og jarðfrøðiliga margfeldið, um vit látast ikki at síggja ta størstu hóttanina, nevniliga vandan fyri lendisspelli og í síðsta enda jarðrivi.

**Friðaður hagi.**
Eitt, sum vildi gjørt lógarverkið einfaldari, var at sagt, at "hagin er friðaður", og síðan lýst, hvussu fram skal farast, tá annað skal verða gjørt í haganum, t.d. velta, byggja, ganga ella annað.

**Rásir og gøtur í haganum**
Ferðing í haganum økist sera nógv í løtuni við at fleiri føroyingar og fleiri ferðafólk leggja sær leiðina út í náttúruna. Í løtuni hendir stórur skaði á lendi á øllum teim mest vitjaðu støðunum, sum t.d. á leiðunum út til Bøsdalafoss, niðan á Slættaratind, við Gjógv, Mykines út til Hólman og nógv onnur støð. Gevur henda lógin heimild til at krevja, at slíkur skaði verður avmarkaður antin við at minka ferðsluna ella við at krevja bygdar rásir?

**Grevstur og skaðandi ferðsla.**
Verandi náttúrufriðingarlóg er sera strong, tá byggjast skal t.d. eitt seyðahús ella annað í haganum, men hon sigur einki petti um grevstur í haganum ella skaðar aftaná koyring við akførum ella tungum maskinum.. Bóndi/eigarar kunnu uttan nakað grava allan hagan upp, so leingi eingin kærir fyri friðingarmyndugleikunum. Verður hesin skeivleikin tikin við í tí nýggju lógini?

**Tøka av grundvatni**
Áhugin og møguleikarnir í Føroyum fyri at gera gagn av grundvatni økjast nógv í løtuni. Har grundvatnið er flótt hava grannaløg og virkir atkomu til virðismikið og orkuríkt jarðfeingi. Í løtuni er størsti trupulleikin, at eingin lóg í Føroyum regulerar nýtsluna av grundvatni. So

leingi eingin føroysk ráevnislóg er (vit hava jú einans eina kolvetnislóg hesum viðvíkjandi), eigur tílíkt at verða tryggjað gjøgnum Náttúrumargfeldislógina.

**Danekræ**

Donsk lóg nýtir hugtakið danefæ um fornlutir, sum staturin kann ognartaka. Fyri nógvum árum síðan kom nýtt hugtak inn í danska lóggávu: *danekræ*. Hetta gevur statinum heimild til at ognartaka jarðfrøðiligar steinrenningar, *danekræ,* og aðrar jarðfrøðiligar lutir, sum eru virðismiklir í museums-samanhangi. Eina slíka heimild sakna vit í føroyskari lóggávu, og tí mæla vit staðiliga til at fáa hana inn í hetta lógaruppskotið.

**Fráboðanarskylda**

Í fornminnalóggávu finst skylda til at boða frá um komið verður fram á forna búseting og onnur fornminnir t.d. í sambandi við útgrevstur ella annað arbeiði. Lógin um náttúrumargfeldið krevur okkurt slag av árinskanningum í sambandi við serligar verkætlanir, men tað hevði verið gott um lógin afturat hesum gevur landsstýrismanninum heimild at gera neyvari reglur fyri fráboðanarskyldu. Her verður t.d. hugsað um, at áleggja byggiharrum av verkætlanum fráboðanarskyldu, um komið verður fram á nakað, sum hevur týdning fyri náttúrumargfeldið og vitan um hetta. Tá kann náttúrufyrisitingin skráseta fráboðanina og taka støðu til, um kanningar skulu setast í verk. Henda tørv síggja vit ofta í sambandi við gerð av vegum og tunlum og øðrum stórum byggiætlanum.

**Boða frá um gongu í haganum**

Vit skilja, at lógaruppskotið tekur ikki støðu til spurningin um tað er neyðugt ella ikki at boða frá til “eigaran”, tá ein fer út í hagan at ganga. Í onkrum av grannalondum okkara finnast vælvirkandi og vælumtóktar reglur um almannarætt. Tað er óheppið, at lógaruppskotið ikki byrjar tilgongdina at avklára spurningarnar um almannarætt og/ella skyldu at boða frá til “eigara”.

**Tøka av gróti til grótgarðar.**

Skaði hendir í løtuni á økir, har nógv hagagrót verður tikið til grótgarðar og aðra grótlaðing. Tá tað ikki verður ansað eftir um slík tøka er burðardygg, er vandi fyri, at erosiónin økist munandi. Hesin trupulleikin eigur at verða reguleraður við lógini um náttúrumargfeldið.

**Tøka av mineralum.**

Lógin nevnir als ikki hetta, at tøka av steinsløgum/mineralum ymsa staðni í Føroyum eigur at verða regulerað og summastaðni bannað. Í minsta lagi eiga Føroyar at hava nakað sum líkist bretsku reglunum, sum verða lýstar í faldaranum “rock-collector’s ethics”

**Leinkjur til nakað av tílíkum tilfari:**

https://scottishgeodiversityforum.org/charter/ethical-rock-collection/
http://www.geonord.org/ethics/codedagu.html
http://www.geonord.org/ethics/etik.html
http://www.geonord.org/ethics/codeswiss.html

**Geodiversity.**
Skotar tosa um landslagsligt og jarðfrøðiligt margfeldi og nýta hugtakið geodiversity. Sera áhugavert er "Scotland's Geodiversity Charter:
https://scottishgeodiversityforum.files.wordpress.com/2011/12/scotlands-geodiversity-charter2018-2023.pdf

Um ynski eru um tað vilja vit fegin greiða frá sjónarmiðjum í hoyringarskrivinum. Vit kunnu eisini greiða frá bóklinginum *At lesa landið*, sum viðger lendisspell og erosión í Føroyum í einum norðurlendskum samanhangi. Vit vilja eisini fegin geva íkast til kravdar allýsingar o.a.m.

Vinalig heilsan

Vegna Jarðfeingi og Búnaðargrunnin

Lis Mortensen
Verkætlanarleiðari
Jarðfeingi
Lis.mortensen@jardfeingi.fo
Tlf 223244